Landssjúkrahúsið
Kommunulæknavaktin og Skaðastovan
J.C.Svabosgøta, 100 Tórshavn, Tlf. 1870  www.ls.fo



# Barnið hevur sligið seg í - lítil heilaskjálvti

Landssjúkrahúsið

**Lítil heilaskjálvti**
Í hesum faldara kunnu tit lesa, hvat tit skulu leggja til merkis, um barn tykkara hevur sligið høvdið í.

Vegleiðingin gevur góð ráð um, hvat barnið skal gera, og hvat tit sum foreldur skulu vera varug við.

Ráðini í vegleiðingini skulu fylgjast fyrstu dagarnar eftir tilburðin. Tó er tað serliga týdningarmikið at halda eyga við barninum
tað fyrsta samdøgrið eftir tilburðin. Í hesum tíðarskeiði skal barnið ikki vera einsamalt, og teir fyrstu tímarnar eftir tilburðin skal barnið vekjast tvær til tríggjar ferðir; hetta fyri at eftirkanna støðuna.

**Fyrsta døgnið skal serliga ansast eftir, um barnið:**

- verður meiri dølskt og fjálturstungið,
- er tungt at vekja,
- vísir tekin til meira høvuðpínu,
- hevur vantandi matarlyst, vaml ella spýr,
- fær krampar

Skuldu onkur av hesum sjúkueyðkennum víst seg, ella kenna tit tykkum sum foreldur onkursvegna ótrygg við støðuna hjá barni tykkara, skulu tit seta tykkum í samband við antin kommunulækna, kommunulæknavaktina ella skaðastovuna.

Tá barnið hevur sligið høvdið í, hevur tað serliga tørv á hvíld og friði; hetta fyri at eftirrákið frá heilaskjálvtanum, sum serliga kann vera afturvendandi høvuðpína, skal hvørva av sær sjálvum.



Góð ráð eru tí, at barnið:

bindur frið teir fyrstu dagarnar eftir tilburðin,
ikki luttekur í ógvusligum spæli ella ítrótti,
ikki hyggur eftir sjónvarpi ella spælir teldu ov leingi í senn
Um barnið framvegis hevur sjúkueyðkenni tveir dagar aftaná løstin, eigur tað at verða eftirkannað hjá lækna.

**Góðan bata!**
Kommunulæknavaktin og
Skaðastovan á Landssjúkrahúsinum

Dato: 25.06.12
Vøru nr. 313180